# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg kenni tað sum mína skyldu at stuðla Barrack Obama, tí hann er tann rætti til forsetaembætið*

*(Oprah Winfrey)*

# Tekur nógv ár at bøta skaðan

**Umleið 9.000 fólk royna at taka upp oljuna, sum rann úr tangaskipinum Hebei Spirit og inn á suðurkoreonsku strondina, har hon ger óbótaligan skaða**

- Tað fer at taka minst tveir mánaðir, áðrenn vit hava fingið ta seinastu oljuna burtur hiðani, og tað fara at ganga nógv ár, áðrenn náttúran kemur aftur í rættlag, sigur suðurkoreanski oljumálaráðharrin Kang Moo-hyun.

Síðani fríggjadagin hava túsundtals hermenn, umhvørvisfólk og sjálvboðin runnið aftur og fram við spannum og baljum, men uppgávan at taka meiri enn 10.000 tons av olju upp er stór. Myndugleikarnir siga, at oljan hevur dálkað meiri enn 40 kilometrar av eysturstrondini, og at ein 150 kilometrar long oljuál toyggir seg frá landi og til havs.

Suðurkoreanska stjórnin kunngjørdi í gjár, at tað dálkaða økið er vanlukkuøkið, og tað ber millum annað í sær, at fiskimenn, alarar og onnur, sum missa inntøku orsakað av dálkingini, fáa rætt til stuðul frá tí almenna.

Oljudálkingin er tann ringasta í suðurkoreonsku søguni. Ein onnur stór vanlukka var í 1995, tá 5.000 tons av olju róku inn á strondina har suðuri í landinum.



*Nógvur sjófuglur heldur til á leiðini, har oljan rekur inn á land, og nógvir fuglar eru longu deyðir*

# Oprah gevur amerikanarum Obama-fepur

**Um vikuskiftið komu 18.500 fólk á veljarafund hjá Barrack Obama, men tað var tó ikki hann, sum var høvuðspersónurin**

-Á Guð, har er hon! Hygg!

Fólk tustu av húsum um vikuskiftið, tá demokratiski senatorurin Barrack Obama helt veljarafund í statinum Iowa. Tá dyrnar fóru aftur, vóru ikki færri enn 18.500 fólk komin á fundin, og so nógv fólk hava ikki verið á veljarafundi í Iowa í hesum valstríðnum fyrr.

So kom høvuðspersónurin á pallin - ikki Barrack Obama, men sjónvarpskvinnan Oprah Winfrey, sum av álvara er farin at hjálpa Obama í dystinum við Hillary Clinton.

-Stundum eri eg hørm um tað, sum hendir í landi okkara, og tí kenni eg tað sum eina skyldu at styðja mannin, sum eftir mínum tykki hevur eina heilt nýggja kós til Amerika, segði Oprah Winfrey. Meiri fekk hon heldur ikki sagt fyri fagnaðinum frá teirri stóru áhoyrarafjøldini.

-Tíðin er komin, til at vit fáa ein svartan forseta, rópti sjónvarpskvinnan, tá hon aftur fekk ljóð.

Oprah Winfrey er uttan iva ein av teimum kvinnunum, sum hava sera stóra ávirkan á amerikanarar, men eygleiðarar ivast í, hvat Barrack Obama veruliga kann fáa burtur úr hjálp hennara. Teir vísa á, at Oprah Winfrey hevur ikki serliga stóra ávirkan á kallkynið, og tá tað serliga eru menn, sum atkvøða á uppstillingarvalunum í USA, er týdningur hennara avmarkaður, halda eygleiðararnir.



*-Barrack Obama er tann rætti forsetin, segði Oprah Winfrey á veljarafundi í Iowa leygardagin*



# Aftur boð eftir Gro

Um vikuskiftið kunngjørdi norski forsætisráðharrin, Jens Stoltenberg, at stjórnin fer at játta tríggjar mia. krónur um árið í trý ár til at bjarga regnskóginum á Jørðini. Samstundis skal eitt altjóða stýri veljast til at umsita pengarnar. Nú hava norskir umhvørvisfelagsskapir mælt stjórnini til at lata fyrrverandi forsætisráðharran Gro Harlem Brundtland leiða stýrið, og Jens Stoltenberg segði í gjár, at hann fer at tosa við Gro um málið. Gro Harlem Brundtland er í dag ráðgevi hjá ST í veðurlagsmálum.

## STUTT SAGT

### Fangar lógu eftirá

Minst 15 fangar doyðu í einari ógvusligari fangauppgerð í einum fongsli í Venesuela um vikuskiftið. Ófriðurin kyknaði leygardagin, tá tveir bólkar av fangum brustu saman við bæði skammbyrsum og knívum. Fongsulsleiðslan sendi boð eftir hermonnum úr tjóðarhirðini, og tað eydnaðist teimum at fáa tamarhald á støðuni. Men tá høvdu minst 15 fangar latið lív. Fyri fýra mánaðum síðani vóru leiðarin og varaleiðarin í hesum sama fongslinum, sum hevur 900 fangar, skotnir.

### Rúmdarferð útsett

Amerikanska rúmdarferjan Atlantis skal út til altjóða rúmdarstøðina ISS, men tað gongst illa at fáa ferjuna avstað. Upprunaliga ætlaði NASA at senda ferjuna avstað seinasta hósdag, men tá var veðrið ikki til vildar, og tí bleiv ferðin útsett til leygardagin. Men tá bar heldur ikki til at senda ferjuna út í rúmdina, tí trupulleikar vóru við einum neyðmotori, og nú er ferðin útsett til 2. januar. Hesaferð skulu sjey fólk úr USA, Týsklandi og Fraklandi við Atlantis, og ørindini eru at seta evropeisku rannsóknarstøðina Columbus umborð á ISS.

### Skiparin fullur

Fríggjadagin rendi russiska farmaskipið South Michelle á land nærhendis Assens á Fyn. Dagin eftir kunngjørdi reiðaríið, sum er danskt, at russiski skiparin hevði fingið sekkin, tí hann hevði drukkið seg fullan, eftir at skipið var farið á land. South Michelle, sum er 2.856 tons til støddar, var á veg inn til Assens, tá tað fór á eitt sandriv. Leygardagin bleiv skipið togað av sandrivinum. Tað vísti seg, at skipið hevði ikki fingið nakran skaða, so tað fór aftur í sigling beinanvegin. Men við øðrum skipara.